# ÁRSFRÁGREIÐING 2024

## KRABBAMEINSFELAGIÐ

Krabbameinsfelagið

**Krabbameinsfelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
Teldupostur: kmf@krabbamein.fo

**Starvsfólk**
Dagligur leiðari: Jansy Gaardlykke
Ráðg. sjúkrarøktarfrøðingur: Anna Kristina Joensen
Skrivstova: Poula Norðbúð

**Nevndin í Krabbameinsfelagnum:**
Formaður: Durita Tausen
Næstformaður: Magnus Magnussen
Kassameinstari: Hansina Mikkelsen
Nevndarlimur: Anna Kristina Joensen
Nevndarlimur: Marnar Fríðheim Kristiansen

Tiltakslimur: Elmar Ósá
Tiltakslimur: Martin Joensen

**Hjálpgrunnurin hjá Krabbameinsfelagnum**
Durita Tausen
Marnar Fríðheim Kristiansen
Jónvør Christiansen

**Team Rynkeby Føroyar Grunnurin**
Rúna Olsen
Durita Tausen
Fríðhild Højgaard

# Innihald

FORORÐ ..... 1
UM KRABBAMEINSFELAGIÐ ..... 2
RÁÐGEVING OG HJÁLP ..... 2
ENDURMENNING OG SEINÁRIN ..... 2
PALLIATIÓN ..... 3
TUBBAK OG SNÚS ..... 3
STUÐUL TIL VERKÆTLANIR ..... 4
BARNAKRABBI ..... 4
ULTRALJÓÐ ..... 4
TELDUTALA ..... 5
KOPPSETING FYRI HPV ..... 5
HAGTØL ..... 6
FRAMVEGIS AFTAN FYRI GRANNALONDINI ..... 6
FUNDIR VIÐ LANDSSTÝRISFÓLK ..... 7
TILLAGAÐ STØRV Í VANDA ..... 8
AÐALFUNDUR ..... 8
TILTØK ..... 8
GRAVGANGUR EFTIR MÓÐURMERKJAKANNING ..... 8
KUNNAÐU Í SALT ..... 9
FYRILESTUR VIÐ HANS PILGAARD ..... 9
KUNNAÐU UM CLL OG MYELOMATOSU ..... 9
TILTAK UM PALLIATIÓN ..... 9
BINDIHUGNI ..... 10
RØRSLA ..... 10
BØKUR ..... 10
BÓK UM SJÚK FORELDUR ..... 10
INNSAVNING ..... 10
GRANNAKAFFI ..... 10
LJÓSAREYÐUR OKTOBER ..... 11
SPYR.FO ..... 11
FØROYA VAKRASTA 1/2 MARATON ..... 11
RASKIR SKÚLANÆMINGAR ..... 11
GINGU 116 KM FYRI KRABBAMEINSFELAGIÐ ..... 11
TEAM RYNKEBY FØROYAR GRUNNURIN ..... 11
LANDSINNSAVNING 26. OKTOBER Í 2025 ..... 12

# FORORÐ

Snarkanningar fyri tarmkrabba og leggja doyðin á at basa lívmóðurhálskrabba. Tey eru millum hægstu ynskini hjá okkum í Krabbameinsfelagnum.

Fyrst tað, sum er at gleðast um.

**Takksemi**

Enn eitt ár við takksemi um nógv og fjølbroytt virksemi.

Rørsla í Suðuroy, Vágum og Havn, bindihugni, bólkur fyri avvarðandi, bólkur fyri kvinnur við undirlívskrabba, bólkur fyri tey, sum hava mist maka, samrøðubólkur fyri ung, sum hava havt krabbamein, hugnaløta í prostatabólkinum umframt nógvar, nógvar samrøður við krabbameinssjúklingar og avvarðandi. Tað er bara ein partur av tí, sum Krabbameinsfelagið – starvsfólk og sjálvboðin – hava gjørt seinasta árið.

2024 er eisini árið, har eldrafeløgini í Eysturoy og Norðoyggjum skipaðu fyri almennum tiltaki um palliatión, Landssjúkrahúsið fór undir kafé-prát um krabbamein, melanomdagur var á Landssjúkrahúsinum, har til bar at fáa kannað móðurmerki, og har vit í bókini "Í morgin fari eg aftur at spæla við babba" hittu Ára, sum leingist eftir pápa sínum, sum er á sjúkrahúsi í Danmark.

Alt hetta ber til, tí – og bara tí – fólk eru, sum gera eitt megnaarbeiði. Sjálvboðin, starvsfólk hjá Krabbameinsfelagnum og øll tey starvsfólkini, sum í sínum yrki eru um tey, sum hava krabbamein ella dragast við ymiskt, tí tey hava havt krabbamein.

Ikki at gloyma – eisini tí, at einstaklingar og virki stuðla Krabbameinsfelagnum peningaliga. Stóra tøkk fyri tað!

Politiska skipanin hevur eisini markað pening til krabbameinsøkið. Tað hevur m.a. gjørt, at tað hevur borið til at styrkt palliativa økið – við fleiri starvsfólkum bæði innan sjúkrarøkt og læknayrkið. Vit gleða okkum at síggja, hvussu hetta næstu árini fer at hjálpa teimum, sum tørva hesa serligu hjálpina sína seinastu tíð.

---

**Snarkanningar fyri krabba í tarmunum og basa krabba í lívmóðurhálsinum**

Nógv stendur enn á ynskilistanum, og altíð fellur tað langligt hjá tí, sum bíðar. Soleiðis er tað bara.

Vit kundu hugsað okkum, at snarkanningarøkið (screeningsøkið) verður víðkað. At fleiri kanningar fara at standa okkum føroyingum í boði.

Tann, sum stendur ovast á listanum, er snarkanning fyri tarmkrabba. Tilmælið er skrivað og latið fyri meiri enn einum ári síðani. Øll hini Norðurlondini bjóða hesa kanningina, annaðhvørt sum royndarverkætlan ella sum fullfíggjaða ætlan.

Okkara áheitan til politisku skipanina er: **Kom nú!**

Hægsta ynskið hjá okkum í Krabbameinsfelagnum er, at stóra gátan verður loyst. At eingin fær krabbamein.

Nú ljóða tey gleðitíðindi úr millum annað okkara grannalondum, at um 10-15 ár kann bilbugt fáast við krabbamein í lívmóðurhálsinum. Fortreytirnar fyri tí eru snarkanningar (screening) fyri lívmóðurhálskrabba og koppseting fyri HPV. Altso at kvinnur taka av tilboðnum um snarkanning, og at børn og ungdómar verða koppsett fyri HPV.

Seinastu tølini frá Landslæknanum eru tó ikki góð, tá ið talan er um HPV-koppsetingina. Skulu vit gera okkum nakrar vónir um, at lívmóðurhálskrabbi eisini skal verða bastur í Føroyum, so mugu nógv fleiri lata seg koppseta.

At tað verður kunnað væl og virðiliga um HPV-koppsetingina, er serstakliga týðandi. Ikki minst, at foreldur eru væl kunnað, tá ið tey skulu gera av, um børnini skulu koppsetast.

Í dag er koppsetingin ókeypis fyri tey, sum eru millum 12 og 17 ár. Tað kundi verið víðkað fyri ein nógv størri aldursbólk, enn tey millum 12 og 17 ár. Tað kann til dømis vera galdandi í eitt ár, so at tey, sum ikki lótu seg koppseta sum barn, kunnu gera tað seinni og ikki halda seg aftur, tí tað kostar ov nógv.

Ímyndið tykkum, at um 10-15 ár fer næstan eingin kvinna at fáa boðini: tú hevur krabbamein í lívmóðurhálsinum. Tað ber til!

**Krabbameinsfelagið heitir staðiliga á politiska myndugleikan saman við okkum at gera eitt megnar átak fyri at fáa fleiri at koppseta seg fyri HPV.**

*Durita Tausen, forkvinna*

## UM KRABBAMEINSFELAGIÐ

Krabbameinsfelagið varð stovnað 17. januar í 1979. Kjarnauppgávan er at upplýsa um krabbamein, bøta um korini hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarðandi, umframt at stuðla gransking viðvíkjandi krabbameini.

Krabbameinsfelagið er óheftur felagsskapur, og ein nevnd við fimm umboðum stýrir felagnum. Krabbameinsfelagið er størsta sjúklingafelag í Føroyum.

### RÁÐGEVING OG HJÁLP

Á skrivstovuni hjá Krabbameinsfelagnum starvast trý fólk – tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar og eitt skrivstovufólk.

Starvsfólkini svara spurningum og ráðgeva teimum mongu, sum dagliga seta seg í samband við felagið. Tey hava samrøðubólkar og samrøður við sjúklingar, avvarðandi og fólk, sum hava verið sjúk av krabbameini. Felagið kunnar, hjálpir og stuðlar bæði undir og eftir sjúku. Eisini teimum, sum hava mist. Hetta verður raðfest høgt, tí ongi skulu standa einsamøll.

Krabbameinsfelagið hevur tilboð og tænastur, sum kunnu hjálpa sjúklingum og avvarðandi. Vitjað verður á sjúkrahúsum, stovnum, skúlum og fyritøkum fyri at hjálpa, ráðgeva og kunna um Krabbameinsfelagið. Felagið luttekur í arbeiðsbólkum og nevndum, sum hava til endamáls at betra umstøðurnar hjá krabbameinssjúklingum og bøta um útgreining og viðgerð. Eisini arbeiðir felagið áhaldandi við at ávirka myndugleikarnar at gera batar á krabbameinsøkinum.

Umframt starvsfólkini á skrivstovuni eru fleiri sjálvboðin, sum skipa fyri tiltøkum og hjálpa til, tá ið felagið skipar fyri stórum tiltøkum. Virksemið hjá Krabbameinsfelagnum er fíggjað við limagjøldum, gávum og innsavningum. Uttan henda stuðulin bar ikki til at reka felagið.

## ENDURMENNING OG SEINÁRIN

Seinárin er eitt øki, sum hevur verið í fokus í 2024, og sum nógv størri dentur má leggjast á komandi árini. Krabbameinsfelagið fegnast um, at nýggj endurmenningar- og endurvenjingartilboð eru sett í verk, bæði í Sjúkrahúsverki, kommunum og Almannaverki. Tilboð, sum hava til endamáls at hjálpa fólki undir og eftir sjúku, eisini tá ið talan er um seinárin. Tað er eisini gott, at Landssjúkrahúsið javnan hevur skipað fyri kafé-práti um árin av krabbameini.

Seinárin eru heilsutrupulleikar, sum kunnu koma av sjúkuni sjálvari ella viðgerð. Talan kann vera um kropslig, sálarlig ella sosial árin, t.d. pínu, møði, nervaskaðar, svøvntrupulleikar, tunglyndi, lymfødem og hjartatrupulleikar. Seinárin kunnu hava stóra ávirkan á gerandisdagin hjá sjúklingi og avvarðandi. Hjá fleiri gerast seinárin varandi.

Viðgerðirnar gerast alsamt betri, og fleiri koma undan við lívinum. Tað merkir, at fleiri liva við seinárinum. Tí er stórur tørvur á endurmenning og at fyribyrgja og bøta um seinárin.

Krabbameinsfelagið heldur, at longu tá ið krabbameinssjúka verður staðfest, eigur meting at verða gjørd av møguligum seinárinum. Við endurmennandi tiltøkum so tíðliga í sjúkugongdini sum gjørligt ber til at fyribyrgja og avmarka neiligu árinini, soleiðis at sjúklingurin kann varðveita lívsgóðskuna og menna virkisførleikar aftur.

Í Krabbameinsætlanini frá 2022 eru fleiri tilmæli um átøk viðvíkjandi endurmenning og seinárinum. Mælt verður m.a. til at stovna eina endurmenningareind í Sjúkrahúsverkinum, og at krabbameinssjúklingar fáa endurmennandi samrøður gjøgnum alla sjúkugongdina.

Tann 15. februar í fjør skipaði Krabbameinsfelagið saman við Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri uppleggi um fatigue (møði/troyttleiki). Fatigue er seinárin, sum nógv fólk, sum hava fingið viðgerð fyri krabbamein, líða av. Tiltakið var í fysioterapiini á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tað var Osla Christiansen, sjúkrarøktarfrøðingur við sergrein innan krabbameinsjúkrarøkt, sum helt fyrilestur um evnið. Nógv fólk møttu, og var hetta eitt sera væleydnað tiltak.

24. mars í ár skipaði Krabbaambulatoriið á  Landssjúkrahúsinum fyri tvørfakligum degi um endurmenning og seinárin. Breið semja var um, at vit hava nógv góð tilboð í Føroyum, men at partarnir ikki altíð vita av hvør øðrum. Tørvur er á at samskipa tilboðini. Avtalað varð at tosa saman regluliga, og at Krabbaambulatoriið og Krabbameinsfelagið kalla partarnar inn aftur til fund - eftir ætlan í heyst.

## PALLIATIÓN

Góð framstig henda innan palliatión. Í løtuni eru tveir serlæknar, Tordis Kristiansdóttir og Marita av Steinum, í ferð við at útbúgva seg í palliatión. Harumframt hevur palliativa toymið fingið 0,4 sjúkrarøktarfrøðistarv afturat. Hetta gevur betri møguleikar, m.a. at fara heim til sjúklingar og at hava meiri frálæru í primera geiranum.

Skjótt fer Krabbameinsfelagið at kunna bjóða skeið fyri avvarðandi hjá palliativum sjúklingum. Hansina Mikkelsen, nevndarlimur og Anna Kristina Joensen, starvsfólk hjá Krabbameinsfelagnum, hava verið á skeið í Noregi, har tær hava fingið útbúgving sum instruktørar í síðstuhjálp. Ætlanin er at hava fyrsta skeiðið fyri avvarðandi í ár.

Síðstahjálp gevur avvarðandi betri vitan og førleikar at vera um tann doyggjandi, m.a. við frálæru í etiskum spurningum, sjúkulinnan og sorgartilgongd.

## TUBBAK OG SNÚS

Tubbak og snús eru týðandi heilsuavbjóðingar í Føroyum. Nógvir føroyingar roykja, og fleiri ung eru farin at brúka aðrar nikotinvørur so sum snús- og nikotinposar.

Krabbameinsfelagið heldur, at myndugleikarnir eiga at gera munandi átøk fyri at minka nýtsluna av tubbaki og snúsi. Vit vita, at royking ber í sær øktan vanda fyri fleiri sløg av krabbameini, umframt aðrar sjúkur so sum KOL og hjarta- og æðrasjúkur. Snús er eisini skaðiligt fyri heilsuna. Nikotin kann elva til krabbamein og hevur haraftrat neiliga ávirkan á hjarta- og æðralag, fruktbæri, lungu, nýru o.a.

Nýggja kanningin hjá Heilsustýrinum "Hvussu hevur tú tað?" vísir, at 18% av teimum spurdu roykja hvønn dag. Hetta er væl meira enn í hinum Norðurlondunum. Viðvíkjandi snúsi siga gott 29% av monnum og 17% av kvinnum í aldrinum 18-24 ár, at tey snúsa (ella brúka nikotinposar) hvønn dag. Eisini í Danmark er nýtslan av nikotinvørum økt millum børn og ung.

Kanningin hjá Heilsustýrinum sæst á heimasíðuni hjá Heilsustýrinum **her.**

Tubbakksídnaðurin er snildur. Tá ið bannað varð at roykja inni, broyttist útboðið av nikotinvørum. Snús, roykfrítt tyggitubbak og nikotinposar fáast nú í alskyns skapum, litum og smakkum og eru tíverri sera væl umtókt millum børn og ung. Krabbameinsfelagið heldur, at eitt munagott stig at gera hesar vørur minni lokkandi kundi verið at sett ávaringar á snúseskjur, sum vit kenna frá sigarettpakkum.

Kringvarpið avdúkaði herfyri, hvussu lætt tað er hjá ungum niður í 15 ára aldur at keypa snús í handlum kring landið. Krabbameinsfelagið vónar, at fleiri átøk skjótast til ber verða sett í verk at tálma sølu og nýtslu av hesum vørum.

Leinki til innslag hjá Kringvarpinum finnur tú **her**.

Tað er gott, at Heilsumálaráðið nú arbeiðir við at dagføra roykilógina frá 2008. Í Krabbameinsætlanini frá 2022 eru fleiri tilmæli um átøk at fyribyrgja tubbaksnýtslu, m.a. at hækka prísin á tubbaksvørum, avmarka hvør kann selja tubbak og leggja størri dent á átøk, hvørs endamál er at forða fyri, at børn og ung fara at roykja.

## STUÐUL TIL VERKÆTLANIR

Fleiri verkætlanir eru í gongd, sum Krabbameinsfelagið hevur stuðlað. Í 2024 veitti felagið trimum verkætlanum stuðul: 100.000 kr. til granskingarverkætlan um barnakrabba, 150.000 kr. til granskingarverkætlan um ultraljóð og 50.000 kr. til teldutalu til børn.

### BARNAKRABBI

Granskingarverkætlanin fevnir um barnakrabba í Føroyum. Endamálið er at kanna, um ílegur eru partur av orsøkini til, at summi føroysk børn fáa krabbamein.

Úrslit frá umfatandi ílegukanningum benda á, at yvir 10% av øllum tilburðum av barnakrabba á einhvønn hátt eru grundaðir á genetikk. Av tí at Føroyar í øldir hava ligið lutfalsliga avbyrgdar, og fólkið stavar frá nøkrum fáum forfedrum, hava vit góðar møguleikar at leita eftir ílegum, ið kunnu elva til barnakrabba.

Verkætlanina hava Team Rynkeby Føroyar, Krabbameinsfelagið, Betri Stuðul, Børnecancerfonden og Kræftens Bekæmpelse stuðlað.

### ULTRALJÓÐ

Verkætlanin, ið Krabbameinsfelagið, Betri Stuðul og privatar fyritøkur hava stuðlað, skal kanna virknaðin við at nýta ultraljóðsvegleidda, innanæðra atgongd til æðrarnar í krabbameinssjúklingum í sambandi við krabbameinsviðgerð.

Góð intravenøs atgongd hevur stóran týdning í krabbameinsviðgerð, men tað kann vera trupult at finna æðrarnar í fólki við krabbameini. Nýggja ultraljóðstólið, sum Krabbaambulatoriið á Landssjúkrahúsinum hevur fingið í gávu frá granskingarverkætlanini, kann í hesum sambandi geva slóðbrótandi møguleikar.

Granskingarverkætlanin, ið á enskum eitur “The Efficacy of Implementing Nurse-performed Ultrasound-guided Peripheral Intravenous Access in Oncology Patients”, fór í gongd í september í fjør og heldur áfram til í heyst.

### TELDUTALA

Endamálið við hesi verkætlanini er at fáa føroyskar barnaøddir til teldutalu.

Føroysk teldutala hevur í nógv ár verið stór hjálp hjá blindum, sjónveikum, orðblindum og øðrum. Higartil hava røddirnar verið ein kvinnu- og ein mannfólkarødd, men ongin barnarødd.

Grunnurin Talutøkni hevur leingi ynskt sær at havt føroyskar barna-teldurøddir, tí hetta kann vera stór hjálp hjá børnum, sum av onkrari orsøk hava lesitrupulleikar.

Grunnurin søkti Krabbameinsfelagið og Team Rynkeby Grunnin um fíggjarligan stuðul til verkætlanina, og umsóknin varð játtað.

## KOPPSETING FYRI HPV

Færri og færri børn og ung verða koppsett fyri HPV (Humant Papillomavirus), og hetta er ein avbjóðing, sum má takast í stórum álvara, heldur Krabbameinsfelagið.

Ein kanning hjá Landslæknanum í fjør um koppsetingar í Føroyum staðfestir, at bara 48,8% av gentum, ið eru føddar í 2010, eru fult koppsettar fyri HPV. Í 1998 var talið 95,3%. At vera fult koppsett merkir í hesum føri at hava fingið tvey prik.

Hjá dreingjum stendur enn verri til. Kanningin hjá Landslæknanum vísir, at bara 27,7% av dreingjunum í 2010-árganginum eru fult koppsettir fyri HPV.  Tveir árgangir frammanundan - í 2008 - var undirtøkan 50,5%.

Tølini hjá Landslæknanum vísa, at undirtøkan fyri HPV-koppseting er munandi lægri í Føroyum enn í Danmark.

Tað er sera týðandi at kunna foreldur um týdningin av, at børnini verða koppsett. Landslæknin sigur tað vera ógreitt, hvør orsøkin er til lágu og minkandi undirtøkuna fyri HPV-koppsetingini, men sama hvør orsøkin er, er tørvur á bráðfeingis átøkum at økja undirtøkuna. Mælt verður til at kanna hugburð hjá foreldrum fyri at finna átøk, sum kunnu bøta um møguligt ivasemi mótvegis HPV-koppsetingini. Heilsustýrið er saman við Talgildu Føroyum í ferð við at menna eina elektroniska skipan, sum skal minna foreldur á koppsetingar.

HPV-virus (Humant Papillomavirus) smittar við kynsligari samveru. Í flestum førum berjir kroppurin ígerðina niður sjálvur, men hjá summum kann virusið elva til kyknubroytingar, sum kunnu elva til krabbamein.

Vanliga hugsanin hevur verið, at HPV-koppsetingin mest verjir gentur og kvinnur ímóti at fáa lívmóðurhálskrabba, men hon fyribyrgir eisini fleiri sløg av krabba hjá mannfólki, umframt at hon forðar báðum kynum í at fáa kynsfinnur.

Mælt verður til, at bæði gentur og dreingir verða koppsett, tá ið tey eru 12 ár. Tá eru tvær koppsetingar. Tey, ið eru blivin 15 ár, tá ið tey fáa fyrstu koppsetingina, skulu hava tríggjar koppsetingar. Koppsetingin er ókeypis fyri tey millum 12 og 17 ár.

Frágreiðingin hjá Landslæknanum um koppseting kann lesast á heimasíðuni hjá Landslæknanum her.

# HAGTØL

## FRAMVEGIS AFTAN FYRI GRANNALONDINI

Føroyar eru framvegis aftan fyri hini Norðurlondini, tá ið tað snýr seg um at koma undan við lívinum, eftir at ein hevur fingið krabbamein. Nýggjastu tølini í dátugrunninum hjá NORDCAN-samstarvinum vísa, at bæði hjá kvinnum og monnum eru Føroyar niðast, tá ið øll krabbameinssløg verða bólkað saman og gjørt verður upp í 5-ára yvirliving.

Nýggjastu tølini fevna um tíðarskeiðið 2018-2022. Tey vísa, at 69,4% av føroysku kvinnunum, sum fáa staðfest krabbamein, eru á lívi fimm ár eftir, at sjúkan er staðfest. Verri stendur til hjá monnunum, tí har er talið 66,7%. Svøríki er tað landið, sum hevur bestu hagtølini á hesum øki.

Tó er gleðiligt, at talið á krabbameinssjúklingum, sum koma undan við lívinum, er økt nógv seinastu áratíggjuni, bæði í Føroyum og hinum Norðurlondunum. Tíðarskeiðið 1978-82 var minni enn 1/3 av føroysku krabbameinssjúklingunum á lívi fimm ár eftir sjúkustaðfesting. Nú eru yvir 2/3 á lívi eftir fimm árum, so ásannast má, at stór framstig eru hend innan krabbameinsviðgerð og sjúkugreinan.

Tó er alneyðugt at kanna, hví føroyskir krabbameinssjúklingar hava verri útlit enn sjúklingar í grannalondunum, og hvussu framstig kunnu røkkast á hesum øki.






Fleiri krabbameinshagtøl eru at finna á heimasíðuni hjá NORDCAN.

## FUNDIR VIÐ LANDSSTÝRISFÓLK

Krabbameinsfelagið hevði í fjør fund við fleiri landsstýrisfólk, har felagið nýtti høvi at tosa um, hvussu ábøtur kunnu gerast á krabbameinsøkinum.

Í februar var fundur við Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum. Her gjørdi Krabbameinsfelagið vart við, at tað er ynskiligt við príshækkingum á tubbaksvørur og rúsdrekka, tí hetta kann tálma nýtsluna.

Felagið hevði eisini fund við báðar landsstýriskvinnurnar í heilsumálum. Fyrst við Margit Stórá, sum var landsstýriskvinna í heilsumálum til í november. Og í desember var fundur við nýggju landsstýriskvinnuna, Súsonnu Bertholdsen.

Á hesum fundum vóru fleiri evni umrødd, eitt nú ávísingar- og útgreiningarskipan, palliatión, tubbak og screening fyri tarmkrabba. Eisini varð tosað um HPV-koppseting og um týdningin at fáa eina screeningseind at taka sær av allari screening fyri krabbamein.

Harumframt hevur Krabbameinsfelagið verið á fundi við Heilsumálaráðið um nýggja heilsupolitikkin, sum ráðið arbeiðir við.

## TILLAGAÐ STØRV Í VANDA

Í heyst legði landsstýrið uppskot fyri tingið um at broyta skipanina við tillagaðum starvi, sum m.a. herdi krøvini til skert arbeiðsføri. Krabbameinsfelagið átalaði hetta, tí ætlaðu broytingarnar høvdu havt sera neiligar avleiðingar fyri m.a. krabbameinssjúklingar.

Fyri at fáa tillagað starv skalt tú hava mist ein triðing ella meira av arbeiðsførinum. Landsstýrið ætlaði at broyta skipanina soleiðis, at helvtin av arbeiðsførinum ella meira skal vera mist fyri at fáa tillagað starv. Hetta hevði gjørt, at ein persónur, sum hevur mist t.d. 40% av arbeiðsførinum, ikki sleppur í tillagað starv.

Krabbameinsfelagið vísti á, at skipanin við tillagaðum starvi er ein sólskinssøga. Hon ger tað møguligt at vera í starvi við einum tímatali, sum persónurin megnar, og við einum lønarískoyti, sum í flestu førum bøtir væl um fíggjarstøðuna.

Tíbetur varð uppskotið tikið aftur.

## AÐALFUNDUR

Á aðalfundinum hjá Krabbameinsfelagnum 23. apríl varð Hansina Mikkelsen nývald í nevndina og kom inn fyri Olgu Kristinu Hansen, sum ikki stillaði upp aftur.

Nevndin skipaði seg soleiðis:

Durita Tausen, forkvinna
Magnus Magnussen, næstformaður
Hansina Mikkelsen, kassameistari
Anna Kristina Joensen, nevndarlimur
Marnar Fríðheim Kristiansen, nevndarlimur

Tiltakslimir eru Martin Joensen og Elmar Ósá.

## TILTØK

Eins og undanfarnu árini, hevur 2024 verið eitt virkið ár hjá Krabbameinsfelagnum. Nógv áhugaverd tiltøk hava verið, sum bæði Krabbameinsfelagið og tey sjálvbodnu hava skipað fyri.

## GRAVGANGUR EFTIR MÓÐURMERKJAKANNING

Mai mánaður er altjóða melanom mánaður, har ljós verður varpað á húð- og móðurmerkjakrabba. 16. mai skipaðu Húðambulatoriið og Krabbameinsfelagið fyri Melanomdegi á Landssjúkrahúsinum, har fólk høvdu møguleika at koma til húðlækna á Húðambulatoriinum at læra meira um móðurmerki og fáa móðurmerki kannað.

Áhugin var sera stórur. Longu seinast í apríl var fullteknað, og yvir 300 stóðu á bíðilista.

Móðurmerkjakrabbi er vandamiklasta slagið av húðkrabba, og talið á tilburðum er økt munandi seinastu 50 árini. Fólk við ljósari húð, ið lætt brenna seg í sólini, eru í størri váða fyri at fáa móðurmerkjakrabba.

## KUNNAÐU Í SALT

Stór fjøld møtti upp í SALT, tá ið Krabbameinsfelagið og stuðulsbólkurin hjá felagnum í Suðuroy skipaðu fyri kunnandi tiltaki.

Armgarð Hammer úr Lip- og lymfødembólkinum, Eirikur Ó. Simonsen úr Prostatabólkinum og Finngerð Mikkelsen úr bróstkrabbabólkinum, Bót til Bata, kunnaðu um arbeiðið hjá hjálparbólkunum og um týdningin, sum bólkarnir hava havt fyri tey.

Anna Kristina Joensen, ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur hjá Krabbameinsfelagnum, kunnaði um Krabbameinsfelagið og mongu tilboðini til sjúklingar og avvarðandi.

Eisini greiddu fleiri fyritøkur, handlar og viðgerðarar frá ymiskum, ið tey høvdu at bjóða.

Eitt framúr væl eydnað tiltak sum enn eina ferð vísti, hvussu stóran týdning øll tey sjálvbodnu hava fyri felagið.

## FYRILESTUR VIÐ HANS PILGAARD

Í juni var fyrilestur á Hotel Føroyum við kenda, danska sjónvarpsvertinum, Hans Pilgaard. Fyrilesturin snúði seg um vón, og í løttum og livandi tóna greiddi hann frá, hvussu tað var at gerast sjúkur av krabbameini, og hvussu hann fótaði sær aftur.

Vón, opinleiki og tey avvarðandi høvdu sera stóran týdning fyri Hans Pilgaard í allari tilgongdini. Hann minti á, hvussu týdningarmikið tað er ikki at steðga at liva, tá ið okkurt í lívinum setir teg í bíðistøðu.

Eitt sera lívsjáttandi kvøld við Hans Pilgaard og teimum umleið 190 áhoyrarunum, sum høvdu leitað sær til tiltakið.

## KUNNAÐU UM CLL OG MYELOMATOSU

Í fjør var høvi at fáa meira at vita um CLL (Kronisk Lymfatisk Leukæmi) og Myelomatosu, ið eru er krabbameinssjúkur í blóðinum og beinmerginum.

Jindrich Mourek, ið er hæmatologur, hevði 15. mai fyrilestur um CLL í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum. Har greiddi hann frá nýggjastu vitan um sjúkuna, viðgerð, eftirviðgerð, og hvussu ein kann liva eitt gott lív við sjúkuni.

11. september hevði Carsten Helleberg, hæmatologur, fyrilestur um Myelomatosu. Eisini her varð greitt frá um nýggjastu vitan innan sjúkuna, viðgerð, eftirviðgerð og at liva eitt gott lív við Myelomatosu.

Krabbameinsfelagið skipaði fyri tiltøkunum í samstarvi við Hæmatologiska Ambulatorium á Landssjúkrahúsinum, umframt at Krabbameinsfelagið skipar fyri samrøðubólkum fyri fólk við hesum sjúkum.

## TILTAK UM PALLIATIÓN

Krabbameinsfelagið luttók í februar á almennum fundi í Løkshøll um palliatión, sum eldraráðini fyri Norðoyggjar og Eysturoynna skipaðu fyri. Til viðgerðar var palliativ viðgerð í Føroyum, og hetta var grundað á álitið "Palliatión í Føroyum", sum varð handað landsstýrinum í 2019.

Á skránni vóru framløgur, og síðani var pallborðsorðaskifti. Forkvinnan í Krabbameinsfelagnum, Durita Tausen, luttók í pallborðsorðaskiftinum.

### BINDIHUGNI

Sum nakað nýtt tók Krabbameinsfelagið í fjør stig til at skipa fyri bindihugna fyri allar kvinnur, ið hava ella hava havt krabbamein. Higartil hevur bindihugni verið tríggjar ferðir, og hevur tað eydnast sera væl.

Tað er ikki neyðugt at duga ella tíma at binda fyri at vera við. Endamálið er at hittast aftur við einum góðum drekkamunni og práta við onnur, sum hava upplivað tað sama.

### RØRSLA

Rørsla hevur stóran týdning fyri kropp og sinn - ikki minst hjá krabbameinssjúklingum. Krabbameinsfelagið hevur havt fleiri rørslutiltøk í farna ári, bæði í Havn, Suðuroy og nú eisini í Vágum.

Felagið skipaði fyri ókeypis qigong-skeiði fyri fólk, sum hava seinárin av krabbameinssjúku og -viðgerð. Talan er um skeið eina ferð um vikuna í seks vikur við Kirstin Ellingsgaard, ið er útbúgvin qigong-venjari. Qigong styrkir kroppin, minkar um spenningar, betrar svøvnin og linnar pínu.

## BØKUR

### BÓK UM SJÚK FORELDUR

Í vár kom út nýggj myndabók, ”Í morgin fari eg aftur at spæla við babba”, sum snýr seg um at hava foreldur, ið gerast sjúk. Pápi Ára er sjúkur og má fara á sjúkrahús í Danmark. Mamman fer við, og ímeðan kemur omman at vera hjá Ára og lítlusystrini. Tað er leingi at bíða, og omman er fitt, men hon er ikki mamma og babba.

Helena Kannuberg hevur skrivað bókina, sum Lena Nicolajsen hevur myndprýtt. Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út.

## INNSAVNING

Fíggjarliga grundarlagið undir Krabbameinsfelagnum er limagjald og gávur. Hetta er m.a. stuðul frá privatfólki og fyritøkum, umframt gávur í sambandi við jarðarferðir.

Harumframt fær Krabbameinsfelagið pening frá innsavningum.

Hetta er felagið ómetaliga takksamt fyri og takkar av hjarta øllum stuðlum. Hvør einasta króna ger mun í stríðnum móti krabbameini og í umsorganini fyri teimum, ið rakt verða.

Krabbameinsfelagið fær ikki almennan stuðul, og tí hava hesar gávur sera stóran týdning fyri felagið.

### GRANNAKAFFI

217.783 krónur komu inn, tá ið Krabbameinsfelagið skipaði fyri Grannakaffi, sum er árliga innsavningin hjá Krabbameinsfelagnum.

Fleiri ymiskir hættir eru at hava Grannakaffi, t.d. at bjóða grannum til kaffi og hava eina bússu standandi, sum kaffigestirnir kunnu lata pening í. Eisini ber til at taka bússuna við til arbeiðis, í skúla, skipa fyri loppumarknaði ella ganga í grannalagnum við bússuni.

## LJÓSAREYÐUR OKTOBER

Bróstkrabbabólkurin, Bót til Bata, hevur í fleiri ár mint føroyingar á bróstkrabba undir átakinum, "Ljósareyður oktober". Endamálið er at minna fólk á at kanna bróstini og at taka ímóti tilboðnum um mammografiscreening soleiðis, at møguligur bróstkrabbi kann staðfestast so tíðliga sum gjørligt.

Í fjør samstarvaði Bót til Bata við Kemilux, sum framleiddi eina serliga hondsápu. Fyri hvønn seldan dunk av hondsápu fekk Krabbameinsfelagið fimm krónur í stuðuli. Ljósareyður oktober gav í fjør 85.759 krónur. Peningurin fer til gransking og arbeiðið hjá Bót til Bata.

## SPYR.FO

Samstarvið millum Spyr.fo og Krabbameinsfelagið hevur 10 ár á baki og útvegar eisini inntøkur, ið gera stóran mun. Spyr.fo er ein spurnartænasta, sum á fartelefonini ger spurnakanningar millum føroyingar. Fyri hvønn luttakara letur tann, sum ger kanningina, fýra krónur til Krabbameinsfelagið. Í fjør var stuðulin frá Spyr.fo 76.760 krónur.

## FØROYA VAKRASTA 1/2 MARATON

Frælsi, ið er felagið fyri frælsan ítrótt í Vágum, hevur í fleiri ár stuðlað Krabbameinsfelagnum í sambandi við tilmeldingina til Føroya vakrasta ½ maraton. Í fjør gav innsavningin 38.650 krónur.

## RASKIR SKÚLANÆMINGAR

Tann 18. juni fekk Krabbameinsfelagið eina serliga fitta vitjan. Hetta vóru 3. flokkarnir í Skúlanum á Fløtum, sum handaðu felagnum 6.767 krónur. Peningin høvdu tey útvegað við at savna og selja fløskur.

Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari í Krabbameinsfelagnum, tók ímóti gávuni og greiddi børnunum frá, hvussu væl hetta munar í arbeiðinum hjá felagnum.

## GINGU 116 KM FYRI KRABBAMEINSFELAGIÐ

Vit eiga ein sera raskan og hjálpsaman ungdóm. Í september gekk Poul Johan á Torvlaðnum saman við vinmonnum úr Gásadali til Viðareiðis fyri at savna pening inn til Krabbameinsfelagið. Teinurin er 116 km.

Poul Johan gekk sama tein í 2023, og í fjør setti hann sær fyri at savna pening inn til eitt vælgerandi endamál samstundis. Sjálvur hevur hann mist fleiri í familjuni av krabba. Við túrinum úr Gásadali til Viðareiðis savnaði Poul Johan á Torvlaðnum 43.696 krónur.

## TEAM RYNKEBY FØROYAR GRUNNURIN

Aftur í fjør savnaði Team Rynkeby Føroyar inn pening til børn við lívshættisligari sjúku og onnur góðgerandi endamál. Inn komu 1.090.000 krónur.

Stuðulin fer í ein grunn, sum Krabbameinsfelagið umsitur fyri Team Rynkeby Føroyar. Grunnurin stuðlar familjum, ið hava børn við lívshættisligari sjúku, umframt at grunnurin stuðlar gransking í sjúkum hjá hesum børnum.

Berin og Sinnisbati fáa eisini part av stuðlinum. Harumframt fær Børnecancerfonden, sum hjálpir føroyskum børnum, ið mugu til Danmarkar í viðgerð, eisini av stuðlinum frá Team Rynkeby Føroyar Grunninum.

## LANDSINNSAVNING 26. OKTOBER Í 2025

Sunnukvøldið 26. oktober í 2025 verður stóra landinnsavningin hjá Krabbameinsfelagnum, "Saman um krabbamein", send beinleiðis í sjónvarpinum.

Endamálið við sendingini er at savna pening inn soleiðis, at Krabbameinsfelagið kann halda fram við týdningarmikla arbeiðinum.

Longu nú kunnu einstaklingar, fyritøkur og feløg stuðla við at flyta pening gjøgnum netbankan á kontu hjá Krabbameinsfelagnum í føroysku peningastovnunum. Nærri kunning um landsinnsavningina er á heimasíðuni hjá Krabbameinsfelagnum www.krabbamein.fo

